# Fann 93.000 kr. í sólmiðstøð

**Ein føroyingur í Danmark gjørdi kvettið herfyri, tá hann fór at taka sól í grannalagnum hjá sær. Í sólmiðstøðini fann hann 93.000 krónur, og týsdagin fekk hann stóra finningarløn frá takksama manninum, sum átti pengarnar.**

HEPPIN FØROYINGUR
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Jan Berg, sum býr á Frederiksberg í Keypmannahavn, hevur nú ráð at fara suðureftir, um honum lystir. Hann er júst vorðin 7.000 krónur ríkari, tí hann stutt undan jólum fór inn í eina sólmiðstøð í grannalagnum. Inni í sólmiðstøðini hekk ein taska við næstan 100.000 krónum, og burturav mongu pengunum fekk Jan Berg týsdagin 7.000 krónur í finningarløn.

- Eg trúði ikki mínum egnu eygum, tá eg kom heim og sá, at taskan var kjokkfull við pengum. Allur kroppurin skalv, so kløkkur og bilsin var eg, greiðir Jan Berg frá.

- Fyrst helt eg, at tað lógu umleið 20.000 krónur í taskuni – ein rúgva av størri og smærri seðlum. Tá eg seinni fór at telja nærri eftir, gekk tað upp fyri mær, at tað lógu 93.000 krónur í taskuni. Tá gjørdist eg upp aftur kløkkari og hugsaði, hvussu í allari víðu verð nakar kundi gloyma so nógvan pening eftir inni í einari sólmiðstøð.

### Royndi at finna eigaran

Eingin annar var staddur í sólmiðstøðini, og tí gjørdi Jan Berg av at taka taskuna heim við. Í taskuni fann hann, umframt nógva peningin, ymisk pappír hjá einum manni úr Teilandi, sum eftir pappírunum at døma búði í Danmark.

Eitt telefonnummar var eisini í taskuni, og Jan Berg umhugsaði tí at ringja til mannin. Hinvegin hugsaði hann eisini um, hvaðani pengarnir stavaðu. Um talan var um pengar frá einum brotsverki, og um hann tí fór at koma sær sjálvum út í óføri við at seta seg í samband við mannin.

Eftir nakað av umhugsunartíð ringdi hann til mannin, men eingin tók telefonina í hinum endanum. Dagin eftir fór hann tí á politistøðina við taskuni og greiddi frá, hvar og hvussu hann hevði funnið peningin. Á politistøðini vóru tey eins kløkk og Jan sjálvur, tí tað er ikki á hvørjum degi, at fólk finna 100.000 krónur.

Jan fekk í fyrsta umfari 2.000 krónur í finningarløn, og politiið lovaði at ringja til hann, tá tey høvdu funnið fram til eigaran. Kanska hevði eigarin hug at geva honum eina hægri finningarløn.



*Jan Berg var forfardur, tá hann stutt fyri jól fann eina tasku við næstan 100.000 krónum. Nú hevur eigarin fingið peningin aftur, og Jan hevur fingið finningarløn*

### Hevði mist vónina

Politiið fór nú undir at leita eftir eigaramanninum, men ikki fyrrenn mánadagin – tríggjar vikur seinni – ringdi politiið aftur til Jan. Tá hevði løgreglan tikið teilendska mannin við á støðina til avhoyringar at vita, hvaðani pengarnir stavaðu.

Tá greiddi maðurin politinum frá, at hann arbeiddi á einari matstovu hjá fosturpápanum í Keypmannahavn, og at peningurin var umsetningur frá matstovuni. Hann varnaðist ikki, at hann hevði gloymt taskuna fyrrenn 20 minuttir eftir, at hann var farin av sólmiðstøðini. Tá hann kom aftur, hekk taskan ikki longur á vegginum.

Sjálvur segði hann, at hann ikki vildi melda tilburðin, tí hann væntaði ikki, at nakar fór at trúgva honum. Hóast sjónbandatól eru á sólmiðstøðini, so var bara "kavi" at síggja frá hesum kvøldinum, hann misti peningin. Hann hevði tí mist alla vón um, at pengarnir skuldu koma afturíaftur.

### Vánaligastu jólini í lívinum

Men so var ikki, og hesum kundi hann takka Jan fyri. Teir báðir hittust á politistøðini týsdagin, og Jan fekk 5.000 krónur afturat frá honum. Eigarin hevði tá gingið øll jólini og nýggjárið við og hugsað um mistu pengarnar. Fyri Jan segði hann, at hetta vóru tey vánaligastu jólini í lívinum.

Onkur annar var kanska ikki farin á politistøðina við pengunum, men hevði hann tankan hevði Jan ongantíð. Hann hugsaði, at onkur saknaði peningin og helst var í einari ólukkuligari støðu. Og ringu samvitskuna, sum hann fyri vist hevði fingið, um hann ikki var farin við pengunum, vildi hann einki hava við at gera.

Í dag er Jan Berg vælnøgdur, og fyri tær 7.000 krónurnar kundi hann keypt sær ein ferðaseðil suðureftir í fjálgu sólina. Men tað ger hann kortini ikki. Fyribils heldur hann seg til handilssólina á Frederiksberg.

-Tað lønar seg betur, sigur hann.

**Til vermóður mína**

## Dany í Jógvanstovu

**á 80 ára degnum**

Hóast tað longu er langt síðani, tú fylti áttati ár, fari eg við hesum at senda tær eina lítla heilsan.

80 ár eru nógvir dagar tilsamans. Eg tori ikki eingong at royna at telja, men dagarnir eru nógvir. Og ikki eru teir farnir til ónýtis. Knoss og baks, stríð og strev - alt við einum smíli, til øll, ið komu framvið. Ikki minst tá tað snúði seg um familju tína, børn tíni, og sum tíðin gekk eisini dýrabaru ommubørn tíni. Nú hevur tú fingið langommubørn, og framvegis oysir tú av, fyri meg at vísa seg, tí ótømandi krukkuni.

At skipa fyri hevur tú altíð dugað. Tá heystið kom vart tú tilreiðar. Baljur, tunnur, íløt, hjallur, fjós, nevn tað, og tað var vaskað. Alt var til reiðar, eingin nýttist at bíða eftir tær. Einki fjas. Vit fingu nál stungna í hondina, og so var bara at seyma. Tað var seg pylsuindir eins væl og fótamørar. Einki var at bíða eftir, skjótari byrjað varð, skjótari var liðugt. Harra Gud viti, hvørjum tað líktist, men seymað varð og tað skjótt.

Hoyggingin kundi inn ímillum verða tung at fara undir, men tá tú skipaði fyri, gekk alt sum eftir ánni. Og sum tú plagar at siga: "Fer alt inn í einari stórari rúgvu, so verður tað gott". Eingin orsøk at ivast, tað tekur eisini alt ov langa tíð. Stutt sagt Dany: Hóast lítil og spinkul hevur tú ongantíð bakkað fyri arbeiði. Tað var og er framvegis bara ein vegur, og tað er at fara í gongd – fáa tað frá hondini.

Røsk og hjartagóð eru bara tveir av teimum eginleikum, ið eyðkenna teg. Fyri meg, hevur tú fylt út millum komma og punktum, sett tingini í perspektiv, givið mær tær rammurnar mær tørvaði. Takk, at tú og Jakku eisini høvdu rúm fyri mær, við øllum mínum feilum, og lótu meg verða partur av familju tykkara.

Ongatíð tá, tíansheldur í dag, letur tú nakran av okkum verða í iva um, at tú hevur eitt aðalmál við lívið tínum, og tað er at vísa á Harran Kristus, sum er tær so kærur, og størstur av øllum. Eisini tað kæra vermóðir, takki eg tær fyri.

**Verdóttir tín Randi**

**Minningarorð um**

## Dánjal Johannus Petersen

**Porkeri**

Seint verður nýggjársmorgun 2002 gloymdur, tá bróðir ringdi heimanífrá og bar boðini, at fløggini í bygdini veittraðu í hálvari stong. Dánjal Johannus var farin bert 31 ára gamal. Tíðin steðgaði, og tárini vóru ikki til at halda aftur.

Hví og hví hann? Spurningar, sum fara at standa ósvaraðir. Harrans vegir eru ikki okkara vegir.

Tankarnir leita aftur í tíðina, tá barnaskógvarnir vórðu traðkaðir í heimbygdini. Minnist ta ferðina, vit báðir fóru á Vatnsnes at fiska síl. Túrurin endaði tó á einum bilverkstaði í Vági, hagar bilurin varð sleipaður, eftir at hol fór á botnkarið á veg niðan á Vatnsnes. Onki síl, men eitt upplivilsi ríkari.

Starv títt hevði tú á smoltstøðini í Grønadali. Arbeiðssemi var títt sermerkið, og ringt verður at taka arbeiðið upp eftir teg á smoltstøðini, har tú við tíni vitan eftir nógv ár vart álitismaður.

Títt stóra ítriv var seyður, og hetta legði tú nógva tíð og stóra orku í. Og væl bar til. Í vetur slaktaði tú ein tann størsta veðrin, ið menn vita at siga um í Føroyum. Lítilláatin vart tú sum fáur, og neyvan var tað tú sjálvur, sum syrgdi fyri, at tíðindini um veðrin bórust í bløðunum.

Sum seyðamaður hevði tú altíð tín góða vin, hundin, við í fylgi. Á túri okkara á Vágfelli, seinast eg var heima, hugtókst tú meg við tí samarbeiði, sum tú og hundurin høvdu. Eftir tínum boðum rak hundurin seyðin, júst so sum tú hevði vant hann at gera. Upplæring av hundi krevur bæði hegni og tol, sum tær var ognað í ríkiligt mát.

Á ferð tíni í stórbýnum fyri tíð síðani stakst tú inn á gølvið. Hugnaligt var at prátað um gamlar dagar. Títt góða lag og blíða lyndi hevði tú við tær, har tú vart.

Dánjal Johannus upplivdi sítt lívsins summar, nú deyðin kom sníkjandi og eirindaleyst rykti hann burtur. Tú og Dóris høvdu valt eina felags framtíð, men lagnan unti tykkum bert stutta tíð saman. Góða Dóris, okkara tankar eru hjá tær í hesi sváru tíð.

Foreldur og systkin og øll tit, ið hava mist, má Harrin styrkja tykkum.

Í slíkari stund eru orð fátøk. Friður veri við minninum um Dánjal Johannus.

**Ein vinur**

# Íslendsk framsýning í Norðurlandahúsinum

**Bjarni Sigurbjörnsson sýnir fram málningar í Norðurlandahúsinum**

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Leygardagin tann 12. januar 2002 kl. 14.00 letur málningaframsýningin hjá Bjarna Sigurbjörnssyni í Norðurlandahúsinum.



Bjarni Sigurbjörnson er føddur í Íslandi 1966 og hevur útbúgving frá Listaskúla Íslands og seinni frá the San Francisco Art Institute, har hann varð Master of Fine Arts í 1996. Í San Francisco undirvísti hann eisini saman við professarum sum Sam Tchakalian, Anne Appelby og Julius Hatofsky

Málningar hansara, ið er abstakt listaverk, málað á glas, eru sýnd fram í Danmark, Íslandi og USA, og hevur hann hevur fingið sera góð ummæli fyri verk síni.

Framsýningin er í Norðurlandahúsinum til og við 10. februar 2002.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gjørdu 80 ára føðingardagin so hugnaligan.
Tøkk fyri vitjan, gávur og telegramm.
Gott nýggjár, øll somul.

**Sigrid Jespersen**





# Trygd í tunlum

**Sosialurin hevur gjørt eitt sindur við tunlar og trygd seinastu tíðina. Sum eitt respons uppá hetta hevur Landsverkfrøðingurin sent út kunningarskriv um trygdina í Føroya tunlum**

TRYGD OG TUNLAR
*Ingrid Bjarnastein*

Í Føroyum hava vit norskar tunlanormar. Har verður millum annað kravt, at trygdarútgerð skal vera í tunlum. Allir nýggir tunlar í Føroyum lúka hesi krøv, og ætlanin er, at teir gomlu skulu fáa útgerðina, sum neyðug er.

Landsverkfrøðingurin luttók á ráðstevnu í Noregi í 1996 um trygd í tunlum. Landsverkfrøðingurin hevur síðani tá so arbeitt við málinum, og í 1999 varð ein bólkur settur at arbeiða við eini tilbúgvingarætlan fyri Kollafjarðartunnilin. Ætlanin er at byrja við Kollafjarðartunnilinum, og síðani flyta arbeiðið so við og við út til hinar tunlarnar í landinum. Henda ætlanin hevur tikið sína tíð, og varð hon ikki liðug fyrr enn beint fyri jól 2001.

### Onki veðhald

Tað ber ikki til at tryggja, at óhapp ongantíð fara at henda. Sum til dømis tær stóru vanlukkurnar í tunlunum í Europa, kunnu tær henda í Føroyum? Tryggjast kann ikki, at tað ikki hendir, men tað sannlíkindini fyri, at tað hendir eru ógvuliga lítil, av tí at ferðslan í Føroyum bert er ein brotpartur av ferðsluni í Miðeuropa.

Í Føroyum er mesta miðalferðslan pr samdøgur í føroyskum tunlum 4.200 bilar, meðan hon er 90.000 bilar í norskum tunlum.

Hagtøl siga, at óhappstíttleikin á veganetinum í Føroyum er lægri enn í hinum norðanlondunum. Um hugt verður eftir óhappstíttleika í tunlunum, har eldur er við, í mun til óhappstíttleika við persónsskaða á vegnum, er tann í tunlunum 90% lægri í tunlunum pr akfarskilometur. Í miðal fyri allar tunlarnar í Føroyum er óhappstíttleikin har eldur er uppi í, 0,02 óhapp pr. mió. akfarskilometur, ella í øðrum orðum 0,15 óhapp um árið. Um hesi tøl verða flutt yvir á Kollafjarðartunnilin, gevur tað okkum eitt tal, sum eitur 0,06 óhapp um árið, ella eitt óhapp hvørt 18. ár. Higartil hava óhappini við eldi í tunlum í Føroyum ikki verið álvarslig, meðan 732 fólk eru skadd á veganetinum, og harav eru 45 deyð.

### Følsk trygd verri enn eingin trygd

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sigur, at peningur og og raðfesting eiga at vera gjørd rætt, tí annars er vandi fyri falskari trygd, og følsk trygd er verri enn eingin trygd. Grundtankin er fyrst at fyribyrgja eldsbruna í tunlum og í øðrum lagi at sløkkja og bjarga. Og hetta, sigur landsverksfrøðingurin, kann setast upp í seks punkt:

1: At fyribyrgja ella minka um vandan fyri óhappum við eini "rættari" konstruktión, t.d. ljósi undir loftinum
2: At hava útgerð soleiðis, at eldur kann sløkkjast innan fáar minuttir, t.d. pulvursløkkjarar
3: At alarmera myndugleikarnar við t.d. neyðtelefon
4: At avmarka avleiðingar við at ávara aðrar bilførarar, t.d. reytt ljós og bummar við innkoyringarnar
5: At avmarka eldin við ikki at nýtta brennbarar konstruktiónir
6: At hava skipaða hjálp, tá ið vanlukkan/óhappið er hent, t.d. eina tilbúgvingarætlan.

Kanningar í Noregi hava víst, at tað er nærum ómøguligt at gera nakað hjálpi- ella sløkkingararbeiði frá royksíðuni, meðan tað ber væl hinumegin. Tí er ætlanin at fáa eina mekaniska ventiatión upp í øllum tunlum, sum hava eina ávísa longd og ferðslu.

*Kelda: Kunningarskriv frá Landsverkfrøðinginum. Hagtølini í nýtt eru eru fyri árini 1990-99 eisini frá Landsverkfrøðinginum.*

# Fleiri skip landað á Tvøroyri

*Vilmund Jacobsen*

**Tvøroyri:** Ikki færri enn fimm skip hava landað á Tvøroyri hesa vikuna. Mikudagin var garnaskipið, Ólavur Hvíti, við 14.000 pundum av havtasku, og sama dagin var Phoenix við 220.000 pundum av upsa.

Hósdagin, tá ið vit frættu, landaði Vesturskin 80.000 pund av kongafiski og upsa, og kl. 13 hósdagin skuldi Suðringur koma við 220.000 pundum av upsa. At enda í røðini kemur garnaskipið, Anita, í dag við 20.000 pundum av svartkalva.

### Byrjaðu mikudagin

Bjarni Hansen, virkisleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri, sigur, at tey keyptu nakað av svartkalva í síðstu viku, og tá vóru nøkur fá fólk til arbeiðis, men verulig gongd kom ikki á aftur fyrr enn mikudagin í hesi vikuni, tá ið alt arbeiðsfólkið varð boðsent.

- Í løtuni hava vit nógvan fisk inni, so her verður ríkiliga at gera teir næstudagarnar, sigur Bjarni Hansen.

